**Prentað í Dimmalætting 19. og 20. mai 2008**

# Tann seinasti deyðadómurin í Føroyum

## Fyrri partur

*Hans Andrias Sølvará*

## Úr Saga Norðoya hjá Viderø

Í Saga Norðuroya sigur Kristian Osvald Viderø frá eini morðroynd í Svínoy miðskeiðis í 1800-talinum. Viderø upplýsir, at Sigga Ólavsdóttir og Mikkjal Jóhannesarson úr Svínoy, sum vórðu gift við ávikavist Skálta-Póli og Onnu Jóansdóttir, skuldu havt roynt at gera av við sínar hjúnafelagar. Grundin var, at tey høvdu fingið hug á hvørjum øðrum og vildu sleppa at liva saman. Mikkjal skuldi havt verið í Havn og hevði fingið hendur á eituri, sum hann gav Siggu burturav. Viderø nevnir einki beinleiðis um dóm, men hann veit tó at siga frá, at Mikkjal Jóhannesarson, Sunda-Mikkjal, varð sendur til Danmarkar at sita í fongsli og ongantíð kom aftur til Føroya. Sigga Ólavsdóttir var hinvegin sambært Viderø ósek í skuldsetingunum um morðroynd, slapp undan dómi og kom aftur til Føroya. Í hesi grein skal vera hugt eitt sindur aftur um hesa søguna hjá Viderø.

## Hjúnaband og ótrúskapur

Sambært Símuni Hansen giftist Anna Jóansdóttir, sum var ættað úr Ytstustovu í Hattarvík í Fugloy, í 1800 við Mikkjal Rasmusarson, sum var kongsbóndi í Svínoy. Hesin Mikkjal doyði longu í 1818, einans 52 ára gamal. Anna Jóansdóttir varð sostatt einkja longu í 1818 og sat einsamøll við festinum í Svínoy eftir Mikkjal. Tá var hon framvegis í bestu árum, einans 43 ára gomul.

Trý ár seinni gifti Anna seg uppaftur við einum ungum manni úr Hvannasundi, sum eisini nevndist Mikkjal. Her er talan um áðurnevnda Mikkjal hjá Viderø, Mikkjal Jóhannesarson, Sunda-Mikkjal, sum var 23 ár yngri enn Anna. Samstundis sum Sunda-Mikkjal fekk eina konu, sum var nakað væl eldri enn hann, tók hann við festinum, sum Anna hevði sitið við síðan hon gjørdist einkja.

Helst hevur aldursmunurin millum Onnu og Sunda-Mikkjal verið heldur stórur. Í øllum førum kom Sunda-Mikkjal nakað væl seinni, í 1844, fyri barn við áðurnevndu Siggu Ólavsdóttir, sum var 6 ár yngri enn hann og 29 ár yngri enn

konan Anna. Símun Hansen sigur ikki meira um lagnuna hjá Mikkjali og Siggu, men hann nevnir tó, at teirra ást og barn mest sum forkom báðum húsunum í Svínoy - hjá Siggu og Mikkjali. Tað ber illa til at vera ósamdur við Símuni í hesum. Sunda-Mikkjal doyði í 1846, men kona hansara, Anna Jóansdóttir, livdi nógv ár afturat. Hetta var tó ikki ætlanin hjá Sunda-Mikkjali. Fyri at skilja lagnuna hjá Mikkjali og Siggu mugu vit fara eini tvey ár longur aftur í tíðina. Her er tað, at vit koma inn á søguna hjá Viderø um morðroyndirnar í Svínoy.

**Fleirfaldar morðroyndir**

Tað er rætt, sum Viderø sigur frá, at Sunda-Mikkjal og Sigga royndu at gera av við konuna hjá Mikkjali, Onnu, men tað er helst ikki rætt, at tey eisini royndu at gera av við mannin hjá Siggu. Í øllum førum var Sigga ikki gift við Skálta-Póli, sum Viderø vil vera við. Sigga varð gift við Jóhannesi Símunarsyni, Jóhannesi Úti á Lag, úr Svínoy, og varð vorðin einkja longu í 1843 - t.e. áðrenn hon kom fyri barn við Sunda-Mikkjali. Skálta-Pól varð giftur við eini dóttir Siggu Ólavsdóttir og Jóhannesi Símunarson. Morðroyndin, - ella rættari morðroyndirnar - sum Sunda-Mikkjal og Sigga framdu móti Onnu Jóansdóttir vórðu gjørdar við at geva henni eitur, men Sigga Ólavsdóttir - ikki Mikkjal, sum Viderø vil vera við - hevði fingið hendur á eitrinum. Við hesum eitrinum royndu Sunda-Mikkjal og systir hansara, Sigga Jóhannesardóttir, fleiri ferðir at gera av við Onnu Jóansdóttir.

Hetta stendur alt í Justitsprotokollini hjá Sorinskrivaranum frá 1836-1847. Tað sæst tó einki til, at tey eisini skuldu havt roynt at gera av við mannin hjá Siggu. Her sæst eisini, at allar morðroyndirnar móti Onnu Jóansdóttir miseydnaðust og vórðu avdúkaðar. Mikkjal Jóhannesarsson og Sigga Ólavsdóttir vórðu handtikin, førd fyri Føroya Rætt í Havn og skuldsett fyri morðroynd móti Onnu Jóansdóttir.

Eisini systkin teirra, Sigga Jóhannesardóttir og Elsebeth Maria Ólavsdóttir vórðu handtikin, flutt til Havnar og saman við Mikkjali Jóhannesarsyni og Siggu Ólavsdóttir skuldsett fyri morðroynd. Sigga Jóhannesardóttir og Elsebeth Maria Ólavsdóttir eru als ikki nevndar í søguni hjá Viderø. Tann fyrra hevði annars verið meira virkin í morðroyndunum móti Onnu Jóansdóttir enn Sigga Ólavsdóttir. Sigga Jóhannesardóttir viðgekk t.d. fyri rættinum, at hon fleiri ferðir hevði givið bróðurkonuni, Onnu Jóansdóttir, eitur. Hon viðgekk eisini, at hon visti, at bróðurin Mikkjal hevði ætlanir um at drepa konuna við hesum somu evnum. Sigga Ólavsdóttir viðgekk, at hon hevði givið Mikkjali sonevnt spanskt fluupulvur, men hon hevði annars ikki eins og hini bæði verið beinleiðis virkin í morðroyndunum móti Onnu Jóansdóttir. Sigga Ólavsdóttir segði í rættinum, at hon visti, at Mikkjal ætlaði at myrða konuna, og at spanska fluupulvurið, sum

hon hevði givið honum, kundi dripið hana, um hon fekk tað niður í seg. Mikkjal Jóhannesarson og Sigga Ólavsdóttir vórðu harumframt skuldsett fyri hor og at hava átt eitt barn uttanfyri hjúnaband. Elsebeth Maria Ólavsdóttir, sum varð krypil, varð eisini skuldsett fyri at hava givið falska frágreiðing fyri rættinum. Tað varð tó mett, at tann ósamanhangandi frágreiðing hennara fyri rættinum m.a. hekk saman við, at hon bæði likamliga og sálarliga varð rættiliga illa fyri.

Føroya Rættur varð eftir hetta til reiðar at fella dóm yvir teir fýra svínoyingarnar.

**Tríggir deyðadómar**

Í *Norsku Lóg Kristians V* frá 1687, sum tey vórðu dømd eftir, stendur í bók 6, kap. 6, stykki 22, at: "*Hvo som overbevisis at have vildet ombragt nogen med Forgift, eller i andre Maader, have forbrut sit Liv*". Dómurin, sum varð feldur í Føroya Rætti 28. august 1845, varð sostatt ikki til at koma uttanum. Føroya Rættur staðfesti eftir forhoyr og rættarviðgerð, at: "*Arrestanten Michael Johannesen og arrestinderne Sigge Johannesdatter og Sigge Olesdatter bør have deres liv forbrudt*". V.ø.o. vórðu tey trý deyðadømd av Føroya Rætti. Elsebeth Maria Ólavsdóttir slapp undan dómi.

Í dóminum hjá Føroya Rætti verður m.a. sagt, at: "*Da disse tre arrestanter, der alle ere over criminel lavalder og af hvilken ingen førhen har været tiltalt eller straffet for nogen forbrydelse, saaledes lovlige ere overbeviste at have villet ombringe arrestanten Michael Johannesens kone, Anne Joensdatter, og om dertil at have valgt saadanne midler, som ifølge Landskirurgens erklæring af 4. f. m. let kunde, om ikke have bevirket, saa dog fremskyndet hendes død*", so skulu tey dømast eftir nevndu grein í Norsku Lóg.

Tann 21. januar 1846 staðfesti Hægsti Rættur í Keypmannahavn: "*at nærværende sag for Michel Johannesens og Sigga Olesdatters vedkommende paa nye skulde foretages ved Underretten og der paa kjendes, efterat blandt andet Sigge Olesdatter for retten er afhørt angaaende hvilken virkning hun forestillede sig, at det spanske fluepulver, som hun gav Michel Johannesen, kunde have paa hans hustru, naar det blev hende indgivet, ligesom der ogsaa om beskaffenheden af dette Middel, naar Qvantiteten af samme er søgt oplyst, er tiloverbragt Læge kyndiges skjøn, og det paa lovlig Maade er oplyst om og forsaavidt det Michel Johannesens hustru indgivne middel have havt skadelig indflydelse paa hendes Helbred*". Føroya Rættur skuldi sostatt taka rættarmálið viðvíkjandi deyðadóminum yvir Mikkjali Jóhannesarsyni og Siggu Ólavsdóttir upp til nýggja viðgerð og dóm. Tað gjørdi Føroya Rættur og 26. september fall nýggi dómurin.

Tá vóru Sigga Jóhannesardóttir og Sunda-Mikkjal deyð meðan tey sótu í varðhaldinum í Havn og bíðaðu eftir tí endaliga dóminum. Í Streymoyar

Kirkjubók sæst, at Sigga Jóhannesardóttir doyði longu 8. oktober í 1845, meðan Sunda-Mikkjal doyði 19. mai í 1846. Sigga Jóhannesardóttir var sostatt longu deyð, tá Hægsti Rættur tann 19. januar 1846 bað Føroya Rætt taka málið upp til nýggja viðgerð, meðan Mikkjal doyði nakað eftir boðini frá Hægsta Rætti. Tað er tí heldur ikki rætt, tá Kristian Osvald Viderø upplýsir, at Sunda-Mikkjal fór til Danmarkar at sita í varðhaldi og ongantíð kom aftur haðani. Hvørki Mikkjal ella systurin Sigga Jóhannesardóttir fóru nakrantíð av landinum at sita dómin.

**Tann seinasti deyðadómurin**

Føroya Rættur kom tískil einans at taka nýggja støðu til deyðadómin yvir Siggu Ólavsdóttir. Føroya Rættur feldi undir leiðslu av J. A. Lunddahl fúta tann 26. september í 1846 fyri aðru ferð tann sama dómin yvir Siggu Ólavsdóttir. Tað varð staðfest, at: "*Arrestantinden Sigga Olesdatter af Svinøe bør have sit liv forbrudt*". Deyðadómurin hjá Føroya Rætti frá 28. august 1845 yvir Siggu Ólavsdóttir varð sostatt staðfestur. Sigga Ólavsdóttir skuldi avrættast fyri morðroynd og hor. Hesin deyðadómurin frá 26. september 1846 yvir Siggu Ólavsdóttir í Svínoy man vera ein av teimum seinastu - um ikki tann seinasti - sum er feldur í Føroyum.

Í úrskurðinum legði Føroya Rættur til grund fyri dómin: "*At Sigga Olesdatter har givet Michael Johannesen det under sagen omhandlede spanske fluepulver har hun selv tilstaaet, ligesom dette med de øvrige fremkomne oplysninger er bestyrket og under forhøret af 12de maj … har hun selv vedgaaet, at hun troede, at Michael Johannesen havde til hensigt at dræbe sin kone ved at indgive hende dette fluepulver, og at hun selv stod i den formening, at Anne, Michael Johannesens kone, kunde dø af det, hvorfor hun ogsaa straks fortrød at have givet ham det. Hun har saaledes havt til hensigt at ombringe Anne Joensdatter, og da hun desuden efter egen tilstaaelse har været vidende om de forskellige mordforsøg Michael Johannesen foretog mod sin kone, kan den omstændighed, at Anne Joensdatter hverken er død af de hende indgivne forskellige gjenstande eller disse efterladt sig nogen bestemt skadelig indflydelse paa hendes helbredstilstand, ikke komme hende til gode*". Sostatt varð Sigga Ólavsdóttir dømd til deyðis fyri aðru ferð av Føroya Rætti eftir ásetingunum í bók 6, kap. 6, stk. 22 í *Norsku Lóg Kristians V*.

**Framhald**

Hvussu gekk víðari í hesum málinum? Hvussu doyðu Sigga Jóhannesardóttir og Sunda-Mikkjal? Og hvat hendi við Siggu Ólavsdóttir? M.a. hesir spurningar skulu viðgerast í seinna parti av hesi grein um tann helst seinasta deyðadómin, sum er feldur í Føroyum.

## Tann seinasti deyðadómurin í Føroyum

### Seinni partur

*Hans Andrias Sølvará*

### Samanumtøka av fyrra parti

Í fyrra parti varð greitt frá, at tríggir svínoyingar, Mikkjal Jóhannesarson, Sigga Jóhannesardóttir og Sigga Ólavsdóttir, vórðu deyðadømdir av Føroya Rætti fyri morðroynd í 1845. Tey trý vórðu deyðadømd fyri at hava roynt at gjørt av við konu Mikkjals, Onnu, við at geva henni eitur - Sunda-Mikkjal og Sigga Ólavsdóttir vórðu eisini dømd fyri hor. Deyðadómurin yvir Siggu Ólavsdóttir varð staðfestur av Føroya Rætti í 1846, eftir at Hægsti Rættur hevði álagt Føroya Rætti at viðgera málið av nýggjum. Her skal verða greitt frá, hvussu leikur síðan fór í hesum helst seinasta deyðadóminum, sum hevur verið feldir í Føroyum.

Fyrst skal vera hugt at, hvat Sigga kundi vænta sær, um dómurin varð útintur.

### Útinning av deyðadómum

Vanlig mannagongd var, at tann deyðadømdi varð hálshøgdur. Soleiðis var tann fyrsti skjalprógvaði deyðadómurin í Føroyum helst útintur. Tað var í 1583, og var tað eisini ein svínoyingur, sum dómurin varð feldur yvir. Hann nevndist Jákup Eyðunsson, og varð dømdur til deyðis fyri "*kætteri*", t.e. blóðskemd. Í Danmark vórðu deyðadómar feldir og útintir við hálshøgging til 1892. Í 16. øld vórðu menn hálshøgdir og kvinnur druknaðar, men *Norska Lóg Kristians V* frá 1687 gjørdi ikki mun á deyðadømdum kvinnum og monnum. Í báðum førum skuldi bøðilin sveiggja øksina og kvetta høvur frá kroppi. Soleiðis kundi Sigga Ólavsdóttir rokna við, at eisini hennara deyðadómur fór at vera útintur.

Hægsti Rættur í Keypmannahavn, sum skuldi taka støðu til allar deyðadómar, var tann seinasta vónin hjá Siggu Ólavsdóttir. Sigga noyddist at bíða í varðhaldinum til 19. januar 1847, men Sigga Jóhannesardóttir og Mikkjal Jóhannesarson sluppu undan at bíða. Deyðin hevði í 1845 og 1846 endaliga sloppið teimum undan bøðilinum og bøðilsøksini. Spurningurin er, hví tvey av trimum deyðadømdum doyðu, áðrenn endaligur dómur fall í Hægsta Rætti.

**Trý deyðadømd og tvey deyðsføll**

Tá Hægsti Rættur 21. januar 1846 gav Føroya Rætti boð um at taka deyðadómin yvir Mikkjal Jóhannesarson og Siggu Ólavsdóttir upp til nýggja viðgerð, varð einki nevnt um Siggu Jóhannesardóttir. Hon var sum nevnt í fyrra parti deyð longu tann 8. oktober í 1845. Av seinna dóminum í Føroya Rætti frá 26. september í 1846 sæst eisini, at hon eins og bróðurin, Sunda-Mikkjal, tá varð deyð. Í dóminum stendur viðvíkjandi útreiðslunum av rættarmálinum: "*Med hensyn til sagens omkostninger vil hun derfor have at tilsvare disse in solidum med Sigge Johannesdatters og Michael Johannesens dødsboer*". Her verður við orðinum "*hun*" sipað til Siggu Ólavsdóttir, men hvørsfalsformurin á nøvnunum, og tað, at orðið "*dødsboer*" stendur í fleirtali, vísir týðiliga, at sipað verður til deyðsbúgvini eftir bæði systkini í Svínoy - Siggu Jóhannesardóttir og Mikkjal Jóhannesarson.

Tað kann tykjast løgið, at tvey av trimum deyðadømdum, sum bæði vóru í góðum árum, hon 56 ár og hann 46 ár, doyðu, áðrenn dómarnir høvdu verið fyri hægri rætt. Deyðstíttleikin var sera høgur í 1800-talinum - serliga í 1846, tá meslingar gingu í Føroyum. Ringast stóð til í apríl, mai og juni, men so hæsaði sjúkan av. Sambært læknanum P. L. Panum, sum var í Føroyum hetta árið, vórðu 6.000 av 7.782 føroyingum smittaðir av meslingunum hesa tíðina. Orsøkin var, at stórt sæð eingin føroyingur, sum var á lívi í 1846, hevði verið í samband við smittuna. Seinast meslingarnir høvdu gingið í Føroyum var í 1781. Immunverjan hjá føroyingum var tí ógvuliga lítil. Í 1846 varð deyðstalið í Føroyum 3-4 ferðir hægri enn miðaltalið fyri tey undanfarnu árini. Í kirkjubókini fyri Norðuroyggjar sæst, at 16 av 19 norðoyingum, sum doyðu hetta árið, doyðu av meslingunum.

Systkinini Sunda-Mikkjal og Sigga doyðu sum nevnt í 1845 og í 1846, skrásett í Havn. Orsøkirnar til at tey doyðu síggjast tó ikki vera meslingar. Sigga doyði áðrenn meslingarnir fóru at ganga - sambært kirkjubókini av "*Tæring*", t.e. helst tuberklum. Hóast meslingarnir vóru í hæddini, tá Mikkjal doyði, so nevnir kirkjubókin løgið nokk onga orsøk til, at hann doyði tann 19. mai 1846 - einans 46 ára gamal. Har stendur einans: "*Død af*" - síðan ein blekplettur og so einki meira. Deyðarevsingina, sum Føroya Rættur feldi yvir systkinini Siggu og Sunda-Mikkjal sluppu tey sostatt ikki undan, hóast bøðilin ikki útinti hana við øksini. Dómurin fylgdi enntá Sunda-Mikkjali í grøvina. Í Streymoyar Kirkjubók stendur, at Mikkjal Jóhannesarson 23. mai 1846 varð: "*Begraven ... i Stilhed uden jordspaakastelse efter Amtsresol: 20/5 46*". Sambært *Ordbog over det Danske Sprog* vórðu tey: "*som ikke ere af den rene og rette Bekiendelse .. i Kirkegaardene begravne .. dog uden nogen Jords Paakastelse af Præsten*". Tað fæst annars einki at vita um, hvussu ella av hvørjum Sunda-Mikkjal doyði, men tað er sannlíkt, at okkurt

annað enn deyðadómurin man hava verið viðvirkandi orsøkin til, at jørð ikki varð kastað á kistu hansara. Í kirkjubókini sæst í øllum førum einki til, at tað sama hendi Siggu Jóhannesardóttir, sum eisini varð deyðadømd, tá hon doyði.

Tað var einans deyðadómin yvir Siggu Ólavsdóttir, sum ikki hevði gjørt stórt annað enn at givið Sunda-Mikkjali tað spanska fluupulvurið, sum Hægsti Rættur skuldi taka nýggja støðu til. Sigga Jóhannesardóttir og Sunda-Mikkjal høvdu snýtt bøðilin og bøðilsøksina, men Sigga Ólavsdóttir livdi framvegis í vónini um, at Hægsti Rættur í Keypmannahavn fór at sleppa henni undan deyðanum.

**Í Hægsta Rætti**

Tann 28. desember í 1846 tók Hægsti Rættur deyðadómin upp til nýggja viðgerð. Sigga Ólavsdóttir sat í varðhaldi í Tinghúsinum í Havn, meðan sakin varð fyri í Hægsta Rætti í Keypmannahavn. Hon slapp sostatt ikki til Keypmannahavnar at verja seg, men Hægsti Rættur tilnevndi henni ein advokat til verja. Ákærin, advokaturin Rutwitt, kravdi: "*at den indankede dom stadfæstes*". T.e. at deyðadómurin hjá Føroya Rætti skuldi staðfestast av Hægsta Rætti. Verjin, sum Hægsti Rættur hevði tilnevnt Siggu: "*indstillede ... hende til Vor mildeste dom*".

Tann 19. januar 1847 tók Hægsti Rættur avgerð og feldi endaligan dóm í málinum. Deyðadómurin hjá Føroya Rætti varð settur úr gildi og ístaðin varð dómur feldur, sum staðfesti, at: "*Sigga Olesdatter bør hensættes til arbeide i Kiøbenhavns Tugthus i 6 aar*". Í úrskurðinum stendur einans, at orsøkin er: "*denne sags forefundne beskaffenhed.*" Harumframt skuldi Sigga Ólavsdóttir og búgvini eftir systkinini Mikkjal og Siggu gjalda allar útreiðslur av drúgva rættarmálinum.

Ein mánað seinni, tann 19. apríl í 1847, varð Hægstirættardómurin kunngjørdur fyri: "*Arrestanten Sigga Olesdatter personligen paa Thorshavns Thinghuus, hvor hun holdes i arrest*". Síðan sæst av skjølunum, at 19. mai í 1847 varð Sigga: "*afleveret til arbeide i Kiøbenhavns Tugthuus i 6 aar*". Sigga fór sostatt líka til Danmarkar, men ikki fyri at vera fríkend, sum Viderø veit at siga frá. Tvørturímóti fór Sigga til Danmarkar fyri at sita tann endaliga dómin, sum Hægsti Rættur feldi yvir hana.

**Endi**

Nøkur ár seinni sæst Sigga aftur at vera í Føroyum. Í 1855 tænir hon á Kirkju í Fugloy, og í 1860 er hon aftur í Svínoy, har eisini einkjan eftir Sunda-Mikkjal, Anna Jóansdóttir, búði. Har hava tær báðar helst onkuntíð skift orð um tað, sum teirra millum var farið fram. Tað var lagnunnar speisemi, at Anna Jóansdóttir,

sum Mikkjal, Sigga og Sigga vórðu deyðadømd fyri at hava roynt at gera av við, yvirlivdi bæði Mikkjal og systir hansara. Í 1870 búði Anna framvegis í Svínoy, 91 ára gomul. Tá var Siggu Ólavsdóttir eisini í Svínoy, 64 ára gomul. Sigga Ólavsdóttir, sum varð deyðadømd tvær ferðir av Føroya Rætti, var sostatt tann einasta av teimum trimum deyðadømdu, sum yvirlivdi rættarmálið. At Sigga kom at liva síni seinastu ár í somu bygd sum Anna er ikki minni hugvekjandi.

Eftir stendur spurningurin, hvat hevði hent við Mikkjali Jóhannesarsyni og Siggu Jóhannesardóttir, um teirra deyðadómar eisini høvdu verið royndir í Hægsta Rætti. Tað er ikki vist, at tey eisini høvdu sloppið undan øksini. Í dóminum í Føroya Rætti stendur soleiðis um Siggu Ólavsdóttir: "*Med arrestantinden, enken Sigge Olesdatters egen begrundelse og de under sagen for øvrigt fremkomne oplysninger er det godtgjort, at hun har gjort sig skyldig i hoer med arrestanten Michael Johannesen, samt ogsaa efter mandens død at have havt legemlig omgang med bemeldte arresstant og avlet et barn med ham, og endeligen i, skjønt paa en mindre virksom maade end de tvende fornævnte arrestanter, at have deltaget i de paa Anne Joensdatter gjorte mordattentater*".

Sigga Ólavsdóttir var sambært rættarúrskriftunum tann av teimum trimum deyðadømdu, sum angraði og hevði verið minst virkin í morðroyndunum. Hjá henni fylla skuldsetingar um hor mest í grundgevingunum hjá rættinum. Tað er møguligt, at tað vóru hesar linnandi umstøður, sum dómurin í Hægsta Rætti sipaði til við orðunum: "*denne sags forefundne beskaffenhed*." Hini bæði, Sunda-Mikkjal og Sigga Jóhannesardóttir, høvdu sambært skjølunum í verki framt allar morðroyndirnar við m.a. fluupulvurinum, sum Mikkjal hevði fingið frá Siggu Ólavsdóttir. Tað kann væl vera, at deyðin slapp teimum báðum systkjunum, Sunda-Mikkjal og Siggu, undan bøðilsøksini, sum varð nýtt í Danmark til 1892.

Tað er í øllum førum til at skilja, hví Hægsti Rættur ógildaði deyðadómin hjá Føroya Rætti yvir Siggu Ólavsdóttir. Her vóru linnandi umstøður, sum sambært skjølunum at døma ikki gjørdu seg galdandi við hinum báðum deyðadómunum.

**Heimildir:**

*Domsakter i Justitssager 1838-1861*. Óprentað (Føroya Landsskjalasavn).
Floto, Inga: *Dødsstraffens kulturhistorie. Ritualer og metoder 1600-2000.* Museum Tusculanums Forlag, Keypmannahavn, 2001.
*Fólkateljingin í 1845*. Óprentað (Føroya Landsskjalasavn).
Hansen, J. S: *Tey byggja land*. 1. og 2. Bind, Egið Forlag, Klaksvík, 1971 og 1973.
Jacobsen, Elin Súsanna: *Slóðir í heilsuverkssøguni*. Føroya Fróðskaparfelag, Tórshavn, 2004.

Jacobsen, Ole (ritstj.): *P. L. Panum og Færøerne. Aktstykker meddelt af Ole Jacobsen*. Prentað í Fra Færøerne: Úr Føroyum, VI bind, Dansk Færøsk Samfund, Keypmannahavn, 1971.
*Justitsprotokol 1836-1847*. Óprentað (Føroya Landsskjalasavn).
*Kirkjubókin fyri Streymoy*. Óprentað (Føroya Landsskjalasavn).
*Kong Christian Den Femtes Norske Lov 15de april 1687. Med Kongeloven 1665*. Universitetsforlaget, Stavanger, 1982.
Ordbog over det Danske Sprog - 1700-1950. http://ordnet.dk/ods/.
Viderø, Kristian Osvald: *Saga Norðuroya*. Bókagarður, Tórshavn, 1994.

**Myndir til fyrra part**:

1. Tey fýra skuldsettu eru í fólkateljingini í Havn tann 24. juni í 1845 skrásett sum: "*Varetægts (fængslede) Arrestanter*" í "*Arresthuset, samt et kammer i Tinghuset*".

2. Her sæst deyðadómurin, sum Føroya Rættur feldi yvir Mikkjal, Siggu og Siggu 28. august í 1845. Tey høvdu við morðroyndum móti Onnu: "*deres Liv Forbrudt*".

3. Her sæst seinni deyðadómurin, sum Føroya Rættur feldi yvir einkjuna Siggu Ólavsdóttir. Dómurin fall 26. september í 1846. Hini deyðadømdu vóru tá deyð.

**Myndir til seinna part:**

4. Her sæst øksin, sum varð nýtt í 1892, tá tann seinasti deyðadómurin við øks varð útintur í Danmark. Seinastu ferð kvinna varð hálshøgd í Danmark var í 1861.

5. Sambært kirkjubókini varð Mikkjal grivin: "*uden jordspaakastelse*". Deyðsorsøk verður ikki upplýst. Maðurin beint niðanfyri, Jóan Ólason, doyði av meslingum.

6. Hægsti Rættur tók málið viðvíkjandi Siggu Ólavsdóttir upp til endaligan dóm 19. januar í 1847. Her varð dómurin broyttur til: "*arbeide i .... Tugthuus i 6 aar*".

solvara@olivant.fo
© Hans Andrias Sølvará